# Greipu-vinnararnir snávaðu

**KVINNUHONDBÓLTUR** VB argaði greipuvinnararnir og fóru avstað við báðum stigunum, tá Stjørnan vitjaði í Vági. Kvinnurnar úr Klaksvík mistu eitt týðandi fet í oddastríðnum

Uni Holm Johannesen

Leikluturin hjá VB verður í hesum kappingarárinum at stjala stig frá oddaliðunum.

Tað riggaði fyrimyndarliga væl í gjár. Kvinnurnar úr Vági vunnu við heili átta málum, tá Stjørnan, sum kappast við Tjaldur og Neistan um finalupláss, royndi seg í høllini í Vági.

VB vann 31-23.

### Fóru undan beinanvegin

Annika Ljósstein legði gestirnar á odda í fyrsta álopinum. Men so gekk bara ein veg hjá Stjørnuni.

Heimaliðið fór buldrandi avstað og fekk heili 10 mál upp í slag, áðrenn kvinnurnar úr Klaksvík svaraðu aftur.

Átta mál vóru á muni, og mótbrekkan varð ov tung hjá Stjørnuni. Heimaliðið var á odda við fýra málum í steðginum. VB setti ferðina upp aftur beinanvegin eftir hvíldina, og tá tóktust sum, at gestirnir høvdu ikki orku at svara aftur.

VB hevði beina kós móti sigrinum, og seinastu løtuna var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Justina Balzarviciute, VB, var toppskjútti við 9 málum. Tað var serliga fyrstu løtuna í seinna hálvleiki, tá heimaliðið fór frá gestunum, at hon var eyðsýnd. Við meiri týdningarmiklum málum syrgdi hon fyri, at kvinnurnar úr Vági fingu eina greiða leiðslu.

### Kunnu reisast í morgin

Tað kom illa við í stríðnum um finaluplássini, at Stjørnan snávaði í gjár.

Klaksvíkskvinnur hava hinvegin møguleikan at reisast longu í morgin, tá VÍF vitjaði í KÍ-høllini.

Stjørnan er eins væl við í kappingini sum áðrenn. Einasti munurin er, at liðið sleppur ikki upp á ovasta plássið, uttan at Neistin snávar í einum av komandi dystunum.

*uni@sosialurin.fo*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stigini komu so í hús

**KVINNUHONDBÓLTUR** Tað var lítið sannførandi, men Kyndil fekk bæði stigini, tá botnproppurin vitjaði í høllini á Hálsi

Uni Holm Johannesen

Trý mál skilti liðini.

Kyndil var greiður favorittur undan dystinum, og hóast liðið greiddi sína skyldu, var tað ikki nógv sum bendi á, hvat av liðunum er botnlið í deildini.

StÍF rann støðugt aftaná, men gav heimaliðið mótstøðu allatíðina. Geir Wardum, venjari hjá Kyndli, skifti út í heilum, og tað ávirkaði spælið.

Eftir steðgin setti heimaliðið ferðina upp og fór trý mál fram um gestirnar. Tað skrædnaði kortini ongantíð av álvara, men sigurin var hinvegin ongantíð í vanda.

Tað merktist eisini, at hvørki Guðrið Eystberg ella Heidi Maria Akselsen vóru við hjá Kyndli. Tær sótu uttan fyri vegna skaða.

Randi Wardum gekk fremst hjá Kyndli. Hon var ágrýtin og ræddist ikki at smekka til, tá møguleikin var til tað. Hon var toppskjútti hjá heimaliðnum við sjey málum.

# Neistin greiddi sína skyldu

**KVINNUHONDBÓLTUR** Neistin vann sum væntað og er nýtt oddalið í SunSet-deildini. Fyribils, í øllum førum




*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Tað kom væl við hjá Neistanum, at Stjørnan snávaði í Vági í gjár.

Tað gevur liðnum ein lítlan fyrimun í tætta stríðnum um finaluplássini. Høvuðsstaðarliðið er trý stig framman fyri Stjørnuna, sum er nummar trý.

Tað var væntað, at Neistin fór at vinna í Vestmanna í gjár. Gestirnir vunnu sær leiðsluna beinanvegin, og heimaliðið rann mest sum bara aftaná.

### Brauer aftur toppskjútti

Barbara Brauer var við aftur á liðnum hjá Neistanum eftir leikbann. Hennara skotstyrki kom aftur liðfeløgunum til góðar hesaferð. Hon var toppskjútti við 11 málum.

Ofta var uppskriftin hjá gestunum bara at spæla upp til Brauer beinanvegin, sum síðan smekkaði til. Tað riggaði so at siga hvørjaferð.

Neistin var serliga sannførandi í verjuspælinum. Tað vóru ágrýtnar og ræddist ikki nærdystirnar. Tað tók broddin av álopsspælinum hjá heimaliðnum. Serliga fekk Liljan Djurhuus, sum oftast er toppskjútti hjá VÍF, lítið pláss.

### Grannauppgerð í morgin

Neistin skal aftur royna at vinna sær tvey stig í skjáttuna í morgin.

Tá er grannauppgerð í høllini á Hálsi, tá Kyndil ætlar at arga grannarnar.

Tað er fyrireikingin áðrenn stóra brakið næsta vikuskifti, tá Tjaldur bíðar Neistanum í Runavík.

*uni@sosialurin.fo*

## VÍF – Neistin 24-33 (11-15)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**VÍF:** Rakul Joensen 6, Liljan Djurhuus 5, Agnas Olsen 5, Halla Djurhuus 4, Tóra Seloy 1, Linda Davidsen 1, Elisa Leo 1, Randi Vigarsdóttir 1.
**Neistin:** Barbara Brauer 11, Jacklin Durhuus 5, Unnur Danielsen 4, Bára Hansen 3, Marjun Danberg 2, Lovisa Andreasen 2, Rakul Magnussen 2, Birita Wardum 2, Katrin á Neystabø 1, Jenny Kragesteen 1.

## VB – Stjørnan 31-23 (15-11)

Dómarar: Hanus Kúrberg og Birgir Sondum

**10 min.: 8-1**
**20 min.: 11-6**
**40 min.: 20-14**
**50 min.: 24-18**

**VB:** Justina Balzarviciute 9, Bára K. Mortensen 5, Gintare Lydekaite 5, Gurið Mortensen 5, Rannvá Johannessen 3, Svava Vestergaard 3, Laila Jespersen 1.
**Stjørnan:** Durita Ljósstein 8, Bára S. Klakstein 4, Anna Kristina Samson 4, Valentina Suciu 3, Una Olsen 2, Annika Ljósstein 1, Edith Hansen 1.
Útvísingar: VB 6 – Stjørnan 2

## Kyndil – StÍF 25-22 (12-10)

Dómarar: Thomas J. Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 4-2**
**20 min.: 9-8**
**40 min.: 17-12**
**50 min.: 20-17**

**Kyndil:** Randi S. Wardum 7, Anja Heinadóttir 5, Jórun Ludvig 3, Rannvá Carlsson 3, Turið Arge 3, Súsanna Petersen 2, Anna Sofía Mohr 1, Annika Sigurðsdóttir 1.
**StÍF:** Fróðrún Danielsen 7, Rebekka Justinussen 5, Birita Poulsen 3, Bára Berthelsen 3, Mariann Petersen 2, Birna Johansen 2.

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 14 | 393 | 322 | 71 | 23 |
| 2 | Tjaldur | 13 | 371 | 293 | 78 | 21 |
| 3 | Stjørnan | 13 | 382 | 315 | 67 | 20 |
| 4 | VB | 14 | 339 | 346 | -7 | 13 |
| 5 | Kyndil | 14 | 342 | 344 | -2 | 1 |
| 6 | VÍF | 14 | 322 | 397 | -75 | 6 |
| 7 | StÍF | 14 | 263 | 395 | -132 | |